# Speedbusters - ein sólskinssøga

**Eftir at fleiri ung fólk vóru deyð í álvarsligum ferðsluvanlukkum í Donsku kommununi Ejby á Fyn, vórðu stig tikin til at minka um talið av deyðsvanlukkunum í ferðsluni - við sera góðum úrsliti**

FERÐSLUTRYGD




*Átakið SPEEDBUSTERS er ein sólksinssøga. Seinastu 4 árini er ongin ungur í aldursbólkinum 18 og 24 ár deyður í ferðsluvanlukku í Ejby kommunu*

Fyri 4 - 5 árum síðani doyðu fleiri ung í fleiri sera álvarsomum ferðsluvanlukkum í donsku kommununi Ejby á Fyn. Og hagtølini vístu, at varð onki gjørt fyri at venda gongdini, so fóru alsamt fleiri ung at doyggja í ferðsluvanlukkum í Ejby kommunu.

Fyri at fáa bøtt um hesa álvarsomu støðu vóru stig tikin til at fáa vent gongdini. M.a. varð farið undir eitt átak, sum fekk navnið **SPEEDBUSTERS**.

Átakið SPEEDBUSTERS var beinleiðis vent ímóti teimum ungu í Ejby kommunu. Men tað, sum var serligt við átakinum var, at tey ungu millum 18 og 24 ár skuldu eisini sjálvi hava ein virknan leiklut í átakinum. Tað vil siga, at samstundis sum tey ungu millum 18 og 24 vóru málbólkur, skuldu tey eisini hava ein virknan leiklut í átakinum; - tey ungu skuldu soleiðis ikki einans vera móttakarar, men í eins stóran mun ein berandi partur í átakinum.



*Symbolið fyri SPEEDBUSTERS var ein rund ferðslutalva við einum líggja innaní. Líggin var í hesum sambandi eitt symbol fyri deyðsvandan, sum er knýttur at bilferðsluni*

## Nógva ferðin um drepur

Endamálið við átakinum SPEEDBUSTERS var í fyrsta lagi at minka um talið av deyðsvanlukkum í ferðsluni. Harumframt varð miðað eftir, at fáa eina broyting í hugburðinum, tá talan var um ta nógvu ferðina í ferðsluni. Seinni parturin av endamálinum var soleiðis eisini ein ásannan, - at **tað er tann nógva ferðin, sum drepur.**

Farið varð undir átakið SPEEDBUSTERS í 2001. Tá varð samstundis gjørt av, at arbeiðast skuldi miðvíst við átakinum fram til summarið 2005. Og nú kemur sólskinssøgan: Seinastu 4 árini er ongin ungur í aldursbólkinum 18 og 24 ár deyður í ferðsluvanlukku í Ejby kommunu. Og hagtølini vísa eisini, at ferðsluvanlukkur har ung - á einhvønn hátt - eru við í ferðsluvanlukkum er fallið við 36 prosentum.

Áðrenn farið varð undir átakið varð gjørt av at hava eitt logo/symbol, sum skuldi minna øll á hetta álvarsama átak. Symbolið, sum bleiv valt, var ein rund ferðslutalvu við einum líggja innaní. So líggin var í hesum sambandi valdur at vera symbol fyri deyðsvandan, sum er knýttur at bilferðsluni.

## Stóra og góða ávirkan

Ein partur av átakinum var, at tey ungu í kommununi á hvørjum ári vóru boðin til ein serligan ferðsludag. Henda dagin sluppu tey m.a. at royna og menna sín koyriførleika. Ein annar partur hevur verið, at tey ungu sjálvi hava fyrireikað fyribyrgjandi ferðslutiltøk

Og skipað hevur eisini verið fyri mongum ymiskum øðrum tiltøkum, sum hava havt til endamáls at bøta um ferðslutrygdina í kommununi, t.d. hava verið regluliig tiltøk har tey ungu hava møtt fólki, sum hava fingið álvarsligt mein í ferðsluvanlukku.

Í eftirmetingunum verður sagt, at átakið SPEEDBUSTERS hevur havt stóra og góða ávirkan á mong viðurskifti. Sagt verður, at borgararnir í kommununi eru samdir um, at tey í dag generelt eru nógv tryggari, og at tey ungu ikki longur koyra ábyrgdarleyst við ov stórari ferð í kommununi

Men tað mest áhugaverda við SPEEDBUSTERS er helst, at tað ber til at fáa tey ungu at átaka sær ein virknan leiklut fyri at bøta um ferðslutrygdina. Og tað er helst eisini tað mest áhugaverda, tá vit hugsa um okkara egnu ferðslutrupulleikar. Les meira: http://www.speedbusters.dk/Default.asp?ID=53

*Kelda: ferðslutrygd.fo*

London Taxi:

# Tvey ára útbúgving sum hýruvognsførari

**Hýruvognarnir í London, teir sonevndu London Taxi, eru eitt sereyðkenni fyri enska høvuðsstaðin. Førararnir á hesum hýruvognum skulu taka eina tvey ára útbúgving, ið kann í støðd sammetast við eina bachelorgrad**

HÝRUVOGNAR

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*




London Taxi eru eitt sereyðkenni fyri enska høvuðsstaðin, sum t.d. dupultdekkararnir og Big Ben. Síðan 1930 hava hesir London Taxi verið gjørdir í Onglandi av ávikavist Morris, Beardmore, Winchester og Austin. Best kendir eru Austin FX3 og FX4.

London er ein av heimsins størstu býum, og hýruvognsførarnir har eru kendir fyri sínar dygdir við at finna veg. Allir nýggir hýruvognsførarar skulu upp til eina próvtøku, sum nevndist “The Knowledge”. Teir skulu í prinsippinum kenna allar adressur í býnum í ein radius upp á 9 kilometrar frá miðbýnum og klára at finna stytsta veg til ein hóp av tilvildarliga valdum adressum og kendum støðum. Eisini skulu teir duga minst 400 adressur uttanat. Útbúgving tekur tvey ár og kann í støðd sammetast við eina bachelorgrad.